tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 04.06.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, ~~Anita Vibergsdóttir~~, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir: Tóki Justinussen

Ikki møtt: Anita Vibergsdóttir

Onnur: Páll Holm Lave, mál 54/26

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 46/26 | 25/00177-1 | Skúlastýrið -árligur fundir við skúlastýrið 2025 |
| 47/26 | 26/00039-1 | Tvøroyrar skúli -Keyp av teldum 2026 (Cromebook) |
| 48/26 | 26/00206-3 | Tvøroyrar Bygda og Sjóvinnusavn -umsókn um stuðul 2026 |
| 49/26 | 21/00080-14 | Uppskot til at betra um av-/áseting og parkering við skúlan/Mýrifípuna |
| 50/26 | 25/00537-2 | Liðugtgerð Tjaldursvegur - Økið rundan um gamla fótbóltsvøllin |
| 51/26 | 26/00198-1 | Útskifting gøtuljós vesturi í dalinum - Hvammavegur, við Rangá og í Lambabyrgi |
| 52/26 | 26/00016-1 | Bygging sum ikki krevur byggiloyvi |
| 53/26 | 26/00212-1 | Kunning til borgarar - Áheitan at klippa trø og runnar |
| 54/26 | 26/00077-2 | Býartorg |
| **Til kunningar** | | |
| 13/26 | 26/00001-1 | Kunning um skattainntøkur 2026 |
| | | |

**Kunning til býráðið**
Kristin Michelsen, borgarstjóri, setur fundin og kunnar um, at Anita Vibergsdóttir hevur fráboðað, at henni berst frá at møta til býráðsfundin í dag, 4. Juni 2026.
Hon hevur heitt á Tóka Justinussen, ið er fyrsti (1.) valdi varalimur á lista T, Felagslistan, til kommunustýrisvalið 12. november 2024, um at møta í staðin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Tóka Justinussen eru loknar.
Einmælt samtykt.

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna – Ongin viðmerking til skránna.

**Til støðutakan**

## 46/26
## 25/00177-1 Skúlastýrið -árligur fundir við skúlastýrið 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.05.2025 | 27/25 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 87/25 |
| 3 Býráðið | 04.06.2026 | 46/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.04.2025**
Avtala er gjørd við forkv. í skúlastýrinum at møta til fundin at greiða frá arbeiðinum í skúlastýrinum. Mælt verður til, at fundurin gevur íblástur og tørvslýsing til inniverandi ár og viðvirkar til rakstrar- og íløgujáttanir til fíggjarætlan hjá Tvøroyrar kommunu 2026.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2025-26**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Varaborgarstjórin greiddi frá um fundin við Skúlastýrið sum var beint áðrenn býráðsfundin.
M.a. fekk nýggja bussskýlið í Trongisvági rós, og eisini framhaldandi arbeiðið við at betra um ferðslutrygdina við skúlan í Trongisvági. Har vóru eisini fleri ynski, sum arbeitt verður við.

**Kommunustjórin 04.11.2025:**
Skúlastýrið er boðið á fund við býráðið 27. november 2025.

**Býráðið 27. november 2025:**
Skúlastýrið møtti til fundin og avtala var at hava fund aftur 26. mars 2026.
.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Skúlastýrið møtti til fundin, har tosa bleiv um mál, sum skúlastýrið hevur ynskir um raðfestingar.
Tekniski leiðarin Georg Muller møtti á fundin og greiddi frá um mál, sum eru sett í gongd viðv. dagføring av skúlabygningum og skúlagarði. -Frágreiðingin tikin einmælt til eftirtektar við áheitan á teknisku umsitingina um hava regluligt samskifið við húsavørðanir.

**47/26**
**26/00039-1 Tvøroyrar skúli -Keyp av teldum 2026 (Cromebook)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2026 | 60/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 02.06.2026 | 65/26 |
| 3 Býráðið | 04.06.2026 | 47/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.01.2025**
Nevndin verður at taka støðu til tilmælið hjá Tvøroyrar skúla um keyp av telduútbúnaði.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Játtan á FÆ2026 §411, avsett kr. 250.000,-

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 11. mai 2026:**
Nevndin mælir til at játta pening til keyp av teldum sambært tilmælinum, og at finna játtan innanfyri «411 Íløga Skúlin».

**Fíggjarnevndin 02. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini at keypa teldum sambært tilmælinum hjá skúlaleiðsluni, og hetta verður játta av «411 Íløga Skúlin».

**48/26**
**26/00206-3 Tvøroyrar Bygda og Sjóvinnusavn -umsókn um stuðul 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2026 | 63/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 02.06.2026 | 66/26 |
| 3 Býráðið | 04.06.2026 | 48/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.05.2026**

Nevndarformaðurin fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn søkir um stuðul til raksturin av savninum fyri 2026.

Savnið hevur ein týðandi leiklut í at varðveita og miðla staðbundna søgu og mentanararv, serliga innan sjóvinnu og bygdarlív. Virksemið fevnir um rakstur av savnsbygningum, framsýningar, savningararbeiði og tiltøk, sum eru við til at styrkja mentanarlívið í kommununi.

**Lógargrundarlag:**

Kommunufulltrúin og løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986 .

**Fíggjarligar avleiðingar: Avsettar eru kr. 380.000,- á FÆ2026, §528**

Mælt verður til at veita stuðul á kr. 380.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn fyri 2026, fíggjað av rakstrarkontu §528.

Mælt býti av stuðulsupphæddini:

- Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-
- Lønir til starvsfólk: kr. 230.000,-
- Umvælingar: kr. 100.000,- (treytað av útgreining/skjalprógvi fyri umvælingum)

**Tilmælið:**

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður mælt til at játta Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn stuðul til raksturin fyri 2026 sambært omanfyri nevnda býti. Málið verður við hesum latið mentanarnevndini og síðani fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 11. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við at játta stuðulin sambært tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 02. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini at veita stuðul til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn á kr. 380.000,- fyri 2026, fíggjað av rakstrarkontu §528.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini at veita stuðul til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn á kr. 380.000,- fyri 2026, fíggjað av rakstrarkontu §528.

## 49/26
## 21/00080-14 Uppskot til at betra um av-/áseting og parkering við skúlan/Mýrifípuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 04.12.2025 | 4/25 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.05.2026 | 25/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 02.06.2026 | 68/26 |
| 4 Býráðið | 04.06.2026 | 49/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 02.12.2025**
Formaðurin í nevndini ynskir at kanna, um møguleiki er fyri at betra um trygdina hjá skúla- og stovnsbørnum við, annaðhvørt at:

- Einsrætta Smærugøtu, so bilar ikki kunnu koyra longri oman enn til krossin sunnanfyri matr.nr. 144am, har Smærugøta og Børkugøta møtast.
- Steingja Smærugøtu av millum skúlan og Mýrifípuna, soleiðis at bilar bert kunnu koyra til stovnin eftir vegnum í neðra, og at tað bert slepst til bústaðarøkið omanfyri stovnarnar eftir vegnum í erva frá.

**Tilmælið:**
Mælt verður til, at umsitingin fær heimild at arbeiða víðari við málinum.

**Ferðslunevndin 04. december 2025:**
Nevndin er kunnað um ætlanirnar, og at arbeitt verður víðari við málinum.

**Tekniska nevnd 13. mai 2026:**
Nevndin mælir til, at kommunan, í einari royndartíð, steingir vegin av fyri bilaferðslu sambært fyriliggjandi uppskoti. Nevndin leggur dent á, at grannar í økinum, sum verða ávirkaðir av vegastongslinum, verða kunnaðir, eins og kommunan kunnar borgarar um ætlanirnar. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 02. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd at, í einari royndartíð, steingir vegin av fyri bilaferðslu sambært fyriliggjandi uppskoti hjá teknisku deild. -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Borgarstjórin mælir til at samtykkja tilmælið frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini um, í einari royndartíð, at steingja vegin "Smærugøta/Børkugøta" eystan fyri skúlan í Trongisvági fyri bilaferðslu sambært fyriliggjandi uppskoti frá teknisku deild.

| Atkvøðugreiðsla: | Fyri | Ímóti | Blankt |
|---|---|---|---|
| Kristin Michelsen: | x | | |
| Tóki Justinussen: | | | x |
| Alvi Mortensen: | x | | |
| Barbara Tausen: | x | | |
| Eyð Eidesgaard: | x | | |
| Bjarni Hammer: | x | | |
| Arnfinn Bech: | | x | |
| **Samandráttur:** | 5 | 1 | 1 |

| Málið samtykt: | JA | NEI |
|---|---|---|
| | x | |

**50/26**
**25/00537-2 Liðugtgerð Tjaldursvegur - Økið rundan um gamla fótbóltsvøllin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 04.12.2025 | 2/25 |
| 2 Tekniska nevnd | 22.12.2025 | 36/25 |
| 3 Tekniska nevnd | 13.05.2026 | 26/26 |
| 4 Fíggjarnevndin | 02.06.2026 | 74/26 |
| 5 Býráðið | 04.06.2026 | 50/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 02.12.2025:**
Tann nýggi vegurin til Froðbiar gjøgnum Heiðarnar er íbundin Tjaldursveg sunnanfyri gamla fótbóltsvøllin á Sevmýri. Í hesum sambandi skal økið skipast av nýggjum, við nýggjum gonguteigum, ljósum og til- og frákoyringum, eitt nú við atliti til, at íbúgvar í økinum hava sum minst ampa av veksandi ferðsluni, sum væntandi fer at vera har í framtíðini.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avsettar eru 1 mió kr til arbeiðið á FÆ2026 §625

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Ferðslunevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Ferðslunevndin 04. december 2025:**
Nevndin er kunnað um ætlanirnar.

**Tekniska nevnd 22. december 2025:**
Nevndin er kunnað og tekur undir við at skipað økið sambært uppskotinum.

**Tekniski leiðarin (GM) tann 05.05.2026:**
Av tí, at tað hevur verið sera ringt at fáa fatur á asfalti í Suðuroynni, hevur verið arbeitt av øllum alvi av kommunu og veitarum at gera økið kring vøllin klárt til asfaltering, áðrenn skipið, sum siglir suður við heitum asfalti, fór av landinum til aðrar uppgávur.

Umframt klárgerð av økinum til asfaltering, er hetta eisini gjørt:

- Nýggj vatnleiðing er løgd í nýggju gongubreytina. 2 nýggir brandpostar eru settir upp í økinum, eins og vatnveitingin er styrkt munandi í økinum kring Tjaldursveg, eins og arbeiðið við at endurnýggja leiðingar í økinum kann byrja.
- Nýggj kloakk er løgd í vegin, sum savnar frárensl frá húsunum omanfyri gamla fótbóltsvøllin, frá Torvheyggi og Tjaldursvegi í nýggju kloakkina, sum er løgd í vegin við Sílá.
- Ristir til avvatning eru gjørdar í vegin framvið vøllinum, og rør ført í Húsgarðsá.
- Kloakkir, sum fyrr runnu í Húsgarðsá, eru leiddar í nýggju kloakkina við Sílá.
- Kantsteinar eru lagdir til gongubreyt, sum skilir nýggja vegin frá Tjaldursvegi, og 2 nýggjar innkoyringar gjørdar til Tjaldursveg.
- Lagdir eru káplar til gøtuljós á øllum vegstrekkinum, eins og onkrir av teimum gomlu pelunum verða útskiftir.

Kommunan hevur fingið prís uppá belegningssteinar frá veitara. Hesir eru av sama slag og góðsku sum teir, ið nýliga eru lagdir í miðbýnum.

Á FÆ2026 er á «§625 Økið við vøllin Sevmýri» avsettar 1.000.000 kr.

Pr. 11.05.2026 eru brúktar **632646,6 kr** av samlaðu játtanini. Tó manglar seinasta rokningin fyri síðsta arbeiðið at leggja kantsteinar enn at koma inn, eins og SEV eigur at gjalda ein part av onkrari rokning, sum kommunan hevur lagt út fyri, sum er tikin við í samlaða yvirlitið.

Tekniska nevnd verður biðin um at taka støðu til, um vit annaðhvørt skulu taka av tilboðnum frá veitara um at leggja belegningssteinar á gongubreytina (tilfar + arbeiði fyri tímaløn), ella um vit skulu asfaltera (óvist er, nær vit fáa asfalt suður aftur.

Viðmerkjast skal, at í fyriliggjandi tilboði frá veitara er talan um 500 m2 av belegningssteinum, tó at gongubreytin bert er umleið 250 m2 til støddar. Hetta kann rættast til, um neyðugt.

**Tekniska nevnd 13. mai 2026:**
Nevndin er kunnað um málið. Mælt verður til, at gongubreytin verður gjørdu belegningssteinum, og at ikki er neyðugt at bíleggja størri nøgd av steinum enn tað, sum skal brúkast til økið. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 02. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Einmælt samtykt

**51/26**
**26/00198-1 Útskifting gøtuljós vesturi í dalinum - Hvammavegur, við Rangá og í Lambabyrgi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.05.2026 | 23/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 02.06.2026 | 77/26 |
| 3 Býráðið | 04.06.2026 | 51/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 04.05.2026:**
Gøtuljósini á vegastrekkinum Hvammavegur/við Rangá og partvíst eisini á syðra enda á vegastrekkinum í Lambabyrgi, treingja til at blíva skift út. Í løtuni eru gamlir træsteyrar við luftlinjum á nevndu vegastrekkjum, og mælir tekniska deild til, at man fær skift allar steyrarnar út við nýggjar úr jarni við LED-ljósum. Kommunan hevur fingið tilboð frá el-innleggjarafyritøku, sum bjóðar seg til at gera arbeiðið, ið inniber fylgjandi:

- Grava hol fyri fundamentum
- Veiting av betongfundamentum
- Veiting av sikringselementum
- Veiting av LED-ljósum
- Arbeiðsløn fyri montering o.a., sum veitarin væntar er umleið 4 tímar í miðal fyri hvønn steyra

Kaðalar eru lagdir allan vegin fyri nøkrum árum síðani, og eru nú funnir fram aftur í vegkantinum.
Tað eru 35 nýggir steyrar, sum skulu setast upp á økinum, og er tað væntandi, at hetta verður eitt arbeiði, sum fer at taka tað mesta av summarinum, alt eftir, um arbeiðið verður gjørt í fleiri stigum, ella í einum. Ætlanin er at brúka sum mest av teimum gomlu el-steyrunum, sum kommunan eigur á goymslu (umleið 20-30 stk). Teir írestandi mugu so bíleggjast.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Umleið 300.000 kr tilsamans
Avsettar eru 500.000 kr á **§627 Nýgerð Froðba og Dalurin** til sama endamál.

**Tilmælið:**
Mælt verður til at taka av fyriliggjandi tilboðið, og seta gongd í arbeiðið sum skjótast.

**Tekniska nevnd 13. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku deild, og ynskir, at arbeiðið verður sett í gongd sambært fyriliggjandi tilboði.

**Fíggjarnevndin 02. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd, og játtanin verður veitt av §627.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Einmælt samtykt

**52/26**
**26/00016-1 Bygging sum ikki krevur byggiloyvi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 2/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 2/26 |
| 3 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.05.2026 | 21/26 |
| 5 Býráðið | 04.06.2026 | 52/26 |

**Málslýsing:**
Í BK17 kap. 1.3 er ásett, at bygging kann ikki fara í gongd uttan skrivligt loyvi frá kommunala byggimyndugleikanum. Eisini er ásett:

- at kommunali byggimyndugleikin kann gera reglur fyri smærri byggingar, soleiðis at hesar ikki krevja byggiloyvi, um bygt verður eftir reglunum. Talan er um antennur, smærri vindmyllur, skeltir, sólskjól, terassur, lívdarskjól og tílíka smærri bygging.
- at kommunali byggimyndugleikin ger reglur fyri, nær umbygging, afturatbygging og umvæling krevur byggiloyvi.

**Lógargrundarlag:**
Føroyska bygningskunngerðin (BK17)

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Tekniska deild mælir til at gera líknandi samtykt sum hjá øðrum kommununum í Føroyum, at fylgjandi arbeiðir kunnu gerast uttan byggiloyvi, við teimum treytum sum eru nevndar niðanfyri og treytað av:

- at ásetingar í byggisamtyktum verða yvirhildnar (herundir fríøki)
- at ásetingar í skeytinum verða yvirhildnar
- at ásetingar í Bygningskunngerðini (BK17) verða yvirhildnar

Tað er ábyrgdin hjá tí sum byggir at syrgja fyri at yvirhalda allar ásetingar. Eru ivamál ella spurningar, eigur tann sum byggir at venda sær til kommunala byggimyndugleikan.

Umsókn um byggiloyvi skal kortini altíð sendast, um:

- serstøk byggisamtykt er galdandi fyri økið, har bygt verður
- bygt verður í neystaøki, øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding
- bygt verður í økjum sum krevja loyvi frá øðrum myndugleikum – td. framvið landsvegi og í økjum sum koma undir náttúrufriðing.

Fráboðast skal á kommunuskrivstovuni um ætlaða bygging eftir hesi vegleiðing.

**Yvirlit yvir arbeiði, sum ikki krevja byggiloyvi:**
Smáir bygningar upp til 10 m2 sum ikki eru upphitaðir, sum t.d. úthús, drívhús, hjallar og líknandi, treytað av:

- at tað í mesta lagi eru 2 stk. tílíkir bygningar á matrikklinum
- at frástøðan til aðrar bygningar á sama matrikli skal í minsta lagi vera 2,5 m (BK17 2.2.3.5)
- at frástøðan til mark er minst 1 m
- at hædd á útveggum ella tekju yvir planeringshædd kann í mesta lagi vera 2,5 m (BK17 2.2.3.5)

Broyting av innrætting í sethúsum, tvíhúsum og líknandi, treytað av:
- at vatn og kloakk ikki er partur av broytingini
- at brunakrøvini verða yvirhildin (BK17 kap. 5)
- at hetta ikki ávirkar berandi konstruktiónirnar (BK17 kap.)

Altanir upp til 5 m2 vídd, treytað av:
- at altanin er 2,5 m frá marki (BK17 kap.)

Útskiftan av taki og útveggjaklæðing, treytað av:
- at orkuparturin í BK17 verður yvirhildin (BK17 kap. 7.4.2)

Útskiftan av vindeygum, úthurðum, portrum v.m., treytað av:
- at orkuparturin í BK17 verður yvirhildin (BK17 kap. 7.4.2)
- at kravið um bjargingarop (BO) verða yvirhildin (BK17 kap. 5)

Smáar antennur og parabolar upp til 1 m í diametur

Garðar við hædd upp til í mesta lagi 1,5m, íroknað rekkverk

Hátún, lehegn, heitir pottar og líknandi

Brenniovnar, treytað av:
- at Sløkkiliðið skal sýna brenniovnin áðrenn hann verður tikin í brúk.

Niðurtøka av bygging minni enn 50 m², treytað av:
- at vegleiðingin um niðurtøku av bygging á heimasíðuni hjá kommununi verður yvirhildin.

**<u>Tekniska nevnd 12. januar 2026:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini. Málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 23. januar 2026:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd.

**<u>Býráðið 29. januar 2026:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd og fíggarnevndini.

**Tekniska deild 20. apríl 2026:**
Skotið verður upp at, at broyta «Yvirlit yvir arbeiði, sum ikki krevja byggiloyvi» og skoyta uppi: «Sólpanel á taki, treytað av, at panelini verða løgd tagparallelt, og ikki vaksa munandi um hæddina av takinum, umframt at uppsetingin ikki ávirkar berandi konstruktiónirnar.»

**Tekniska nevnd 13. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku deild. Einmælt samtykt.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Einmælt samtykt til mælið hjá teknisku nevnd

## 53/26

## 26/00212-1 Kunning til borgarar - Áheitan at klippa trø og runnar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.05.2026 | 27/26 |
| 2 Býráðið | 04.06.2026 | 53/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 12.05.2026:**
Ein afturvendandi trupulleiki í kommununi er, at trø og runnar, sum veksa inni í garðinum hjá borgarum í kommununi, ikki blíva klipt regluliga. Hetta ger, at greinar ofta stinga út á vegin, til ampa fyri ferðslu, nærmastu grannar, gøtuljós, skelting o.l.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Mælt verður til at orða eina reglugerð, sum áleggur borgarum í kommununi at halda træ- og runnavøkstur viðlíka, so tað ikki er til ampa fyri ferðslu, grannar o.s.fr.

**Tekniska nevnd 13. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum. Einmælt samtykt.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd.

**54/26**
**26/00077-2 Býartorg**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 27/26 |
| 2 Býráðið | 27.02.2026 | 19/26 |
| 3 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 15/26 |
| 4 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 42/26 |
| 5 Býráðið | 04.06.2026 | 54/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.02.2026**

## Býartorg á matr.nr. 373b á Tvøroyri

Tvøroyrar kommuna hevur sett sær fyri at menna og skipa miðbýin við at gera eitt nýtt býartorg mitt á Tvøroyri á matr.nr. 373b. Økið hevur í dag avmarkaða funktión sum savningarstað, men staðsetingin er týðandi í mun til ferðslu, trivnað og framtíðar nýtslu av miðøkinum. Við at gera hetta til eitt býartorg verður lagt upp til at skapa eitt greitt og innbjóðandi miðstaðarøki, sum bæði kann nýtast til gerandis uppihald og parkering, og samstundis kann virka sum ein natúrligur pallur undir tiltøkum, hátíðarhaldum og øðrum felagsløtum.

Ætlanin verður framd í stigum samsvarandi heildaruppskoti hjá BRIM arkitektum. Stigvís fremjan ger tað møguligt at raðfesta tær mest átrokandi og virðisskapandi loysnirnar fyrst og síðani byggja víðari, tá fíggjarligir karmar og tørvur loyva tí. Býráðið hevur samtykt at avseta kr. 2,0 mió. til verkætlanina á fíggjarætlanini 2026, og játtanin er grundarlagið undir fyrstu raðfestu átøkunum.

Í sambandi við raðfestingina er dentur lagdur á at nýta játtanina soleiðis, at úrslitið ger mun beinanvegin og samstundis leggur eitt gott fundament undir seinni stig. Serliga verður arbeitt við vestara parti av torginum, har økið og parkeringsøkið niðanfyri Sjógøtu 2 skulu bindast betur saman, so rørslumynstrið og atkoman í miðstaðarøkinum gerast greiðari og tryggari.

Ein høvuðsbroyting í hesum fyrsta stigi er, at koyrivegurin “Sjúkhúsbrekkan” verður tikin burtur og í staðin gjørd trappur og aðrar atkomu møguleikar, sum stuðlar undir eina meir samanhangandi heild.

Umsitingin mælir til, at býráðið gevur heimild at arbeiða víðari við fyriliggjandi uppskoti, soleiðis at verkætlanin kann mennast til eitt ítøkiligt og raðfest grundarlag til støðutakan.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2026, §609, játtan kr. 2.0 mió

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Borgarstjórin mælir til at umsitingin fær heimild til at fremja eina stigvísa tillaging av býartorginum, samsv. fyriliggjandi ætlan hjá BRIM innanfyri verandi játtan á FÆ2026. -Einmælt samtykt

**Býráðið 26. februar 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**Tekniska nevnd 09. marts 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd, at fremja eina stigvísa tillaging av býartorginum, samsv. fyriliggjandi ætlan hjá BRIM innanfyri verandi játtan á FÆ2026

**Kommunustjórin 08.05.2026:**
Avtala er gjørd við, at BRIM ark. um at leggja fram ætlan um Miðbýartorg, har støða skal takast til raðfesting, kostnað og møguligt fyrsta útbjóðingarstigi.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Páll Holm Lave møtti á fundin og greiddi frá ætlanum um Býartorg. Býráðið tekur einmælt undir við fyriliggjandi ætlan um nýtt miðbýartorg, við smávegis broytingum, soleiðis sum lýst var til framløguna. Somuleiðis verður tikið undir við fyribils kostnaðarmetingini fyri verkætlanina, og at verkætlanin er liðug til mentanarnáttina 2027.

Til kunningar

## 13/26
## 26/00001-1 Kunning um skattainntøkur 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 2/26 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 3/26 |
| 4 Býráðið | 27.02.2026 | 2/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 4/26 |
| 6 Býráðið | 27.03.2026 | 3/26 |
| 7 Býráðið | 05.05.2026 | 7/26 |
| 8 Býráðið | 04.06.2026 | 13/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 06.01.2026**

### skattaintøkur (kunning)

**Endamál:** At kunna býráðið um gongdina í skattaintøkum hjá kommununi higartil í ár, sum kann samanberast við fíggjarætlan, og meta stutt um væntaðu gongdina fyri restina av árinum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Málið vart umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. januar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 26. februar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. mars 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 05. mai 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 04. juni 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 18:10

Kristin Michelsen

Tóki Justinussen

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech